FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið

Argir, 25. juli 2016

J.Nr.: 15/00491-4

Løgtingsmál nr. 08/2016: Uppskot til løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð

Uppskot til

Løgtingslóg
um
Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð

Kapittul 1
Landsbanki Føroya

§ 1. Landsbanki Føroya er almennur fíggjarstovnur og greiningarstovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum.
Stk. 2. Landsbanki Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini.

Bygnaður

§ 2. Landsbanki Føroya er undir leiðslu av einari nevnd og einum stjóra.
Stk. 2. Nevndin er skipað við 7 limum og 7 varalimum, sum landsstýrismaðurin velur fyri eitt 3 ára tíðarskeið og kunnu veljast aftur í mesta lagi 4 ferðir. Tá limur ikki hevur sitið í nevndini í eitt 3 ára skeið, kann hann tilmælast aftur, á sama hátt sum aðrir limir. Limirnir verða tilnevndir soleiðis:

1) 2 limir og 2 varalimir verða tilnevndir av landsstýrismanninum,
2) 2 limir og 2 varalimir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya,
3) 1 limur og 1 varalimur eftir tilmæli frá arbeiðsgevarafelagnum,
4) 1 limur og 1 varalimur eftir tilmæli frá fakfeløgunum, og
5) 1 limur og 1 varalimur eftir tilmæli frá Kommunufelagnum.

Stk. 3. Limirnir í nevndini skulu hava fakligar førleikar innan eitt ella fleiri av hesum førleikaøkjum: búskaparfrøði, fígging og kredittmeting, serligt innlit í føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum. Nevndarlimirnir skulu samanlagt fevna um allar hesar førleikar.
Stk. 4. Um so er, at tey innstillaðu ikki hava ein nóg breiðan ella nøktandi fakligan førleika, kann landsstýrismaðurin biðja um nýggj tilmæli.
Stk. 5. Persónar, ið javnan kunnu væntast at verða ógegnigir í málsviðgerðini hjá nevndini eftir reglunum í kapitli 2 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg, kunnu ikki vera limir í nevndini.
Stk. 6. Nevndin skipar seg sjálv við forkvinnu ella formanni og næstforkvinnu ella næstformanni.
Stk. 7. Landsstýrismaðurin hevur rætt at luttaka á nevndarfundum.

§ 3. Nevndin setir og loysir stjóran úr starvi.

§ 4. Nevndin ger reglur fyri virksemið hjá nevnd og stjóra.
Stk. 2. Nevndin ger neyvari ásetingar fyri, hvussu gjaldføri landsins skal umsitast.
Stk. 3. Nevndin ger ásetingar fyri umsiting av landsins skuld.

§ 5. Nevndin tryggjar, at Landsbanki Føroya fylgir almennum reglum, sum eru galdandi fyri almennar stovnar.

Fíggjarvirksemið hjá Landsbanka Føroya

§ 6. Landsbanki Føroya er fíggjarstovnur landsins. Kommunur og almennir grunnar kunnu nýta Landsbanka Føroya sum fíggjarstovn.

§ 7. Landsins gjaldføris- og skuldarviðurskifti verða fyrisitin av Landsbanka Føroya eftir nærri áseting frá nevndini.

§ 8. Landsbanki Føroya kann taka upp lán í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

§ 9. Landsbanki Føroya umsitur ogn og skuld landsins. Landsbankin kann umsita ogn og skuld hjá kommunum og almennum grunnum.
Stk. 2. Í førum, har Landsbanki Føroya umsitur ogn og skuld, fyrireikar stjórin tey mál, ið avgerð skal takast um.

§ 10. Landsins gjaldføri verður umsitið av Landsbanka Føroya eftir ásetingum frá nevndini.
Stk. 2. Umsitingin av landsins gjaldføri hevur sum endamál:
1) at landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann halda sínar skyldur,
2) at landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
3) at landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Stk. 3. Landsins gjaldføri fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum og stovnum o.ø., ið fevndir eru av § 2, stk. 1 í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald o.a.
Stk. 4. Til landsins gjaldføri verður roknað landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum, ótrektir kredittir í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

§ 11. Landsstýrismaðurin skal skipa fyri, at landsins gjaldføri í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári.
Stk. 2. Í august mánaði á hvørjum ári ásetir nevndin upphæddina eftir stk. 1.
Stk. 3. Eru greiðar ábendingar um, at landið ikki líkur krøvini í stk. 1, skal nevndin mæla landsstýrismanninum til at økja gjaldførið, og nær tað í seinasta lagi skal vera gjørt.
Stk. 4. Landsstovnar kunnu ikki plasera pengar, taka kredittir, gera avtalur um fíggjarlig avleidd amboð ella taka aðrar líknandi fíggjarligar avgerðir uttan loyvi frá Landsbanka Føroya.

§ 12. Nevndin ger við atliti at § 4 eina íløgustrategi fyri plaseringar av landsins gjaldføri. Íløgustrategiin er almenn.

§ 13. Landsbanki Føroya fyrisitur landsins lántøku. Landsbanki Føroya fremur hetta eftir ásetingum frá nevndini.
Stk. 2. Lántøka kann einans verða framd við undirskrift frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum og við nøktandi heimild í løgtingslóg.
Stk. 3. Landsins lántøka skal vera til marknaðarkor.
Stk. 4. Landsbanki Føroya situr fyri dagligu umsitingini av landsins lánum eftir ásetingum frá nevndini sambært § 4, stk. 3.
Stk. 5. Landsbanki Føroya kann veita lán til kommunur og almennar grunnar.

Greiningarvirksemið hjá Landsbanka Føroya

§ 14. Høvuðsuppgávan er at gera fíggjarligar váðagreiningar.
Stk. 2. Virkisøkið fevnir um eftirlit og greining av búskaparligum viðurskiftum við serligum atliti at váðum í fíggjarkervinum og øðrum pørtum av búskapinum, ið kunnu hava ávirkan á fíggjarliga støðufestið í síni heild.

Heimild at savna, viðgera og lata upplýsingar

§ 15. Landsbanki Føroya savnar inn, viðger og almannakunnger hagtøl innan fyri sítt virkisøki og kann nýta hagtalsupplýsingar í tann mun, tað er neyðugt til at fylgja endamálinum sambært § 1.
Stk. 2. Landsbanki Føroya kann biðja løgfrøðiligar og likamligar persónar, landsstovnar, grunnar, almenn partafeløg, kommunur og kommunal feløg o.o. um innan ávísa freist at lata upplýsingar, ið viðkomandi hava um hendi, og sum eru neyðugir fyri virkisøkið hjá Landsbanka Føroya. Hesir eru:

1) Løgfrøðiligir og likamligir persónar við heimstaði í Føroyum, sum virka sum fíggjar- og tryggingarstovnar.
2) Løgfrøðiligir og likamligir persónar við heimstaði í Føroyum, sum hava annað virksemi enn tað, sum er nevnt í stk. 2, nr. 1.
3) Løgfrøðiligir og likamligir persónar við heimstaði í Føroyum, sum hava givið út ella eiga virðisbrøv, ella skipa handil við ella clearing og avgreiðslu av fíggjaramboðum.
4) Deildir og dótturfeløg o.a. hjá fíggjarstovnum í Føroyum, ið ikki koma undir at vera løgfrøðiligur ella likamligur persónur, men sum annars koma undir allýsingar í nr. 1-3.

§ 16. Landsbanki Føroya kann lata víðari allar upplýsingar, í tann mun og við tí nágreinan, ið eru neyðugir fyri at inna arbeiðið á virkisøkinum, til Føroya váðaráð, hagtalsmyndugleikar og aðrar myndugleikar, ið virka fyri fíggjarligum støðufesti.
Stk. 2. Upplýsingar, ið kunnu latast sambært stk. 1, eru allar upplýsingar, ið gera tað møguligt beinleiðis ella óbeinleiðis at eyðmerkja teir í § 15, stk. 2 nevndu persónar o.a.

Fíggjarlig viðurskifti

§ 17. Landsbanki Føroya verður stovnaður við 20 mió. kr. í fæi.
Stk. 2. Fæið kann nýtast at javna inntøkur og útreiðslur í mun til virksemi landsbankans.
Stk. 3. Fæið er uttanhýsis partur av landsroknskapinum, og virksemið er ikki tikið við á fíggarlóg.
Stk. 4. Nevndin ger nærri reglur um, hvat fæið kann brúkast til.

§ 18. Landsbanki Føroya er fíggjaður við játtan á løgtingsfíggjarlógini.
Stk. 2. Landsbanki Føroya fær $4^0/_{00}$ av tí í § 11, stk. 2 ásettu upphædd fyri røkt av gjaldføri og skuld landsins.
Stk. 3. Landsbanki Føroya kann hava inntøkufíggjað virksemi.

§ 19. Roknskapur bankans skal grannskoðast av landsgrannskoðaranum.

§ 20. Landsbanki Føroya er sum almennur stovnur undantikin øllum skattum og avgjøldum.

Kapittul 2
Føroya váðaráð

§ 21. Føroya váðaráð er myndugleiki, ið skal eyðmerkja og hava eftirlit við systemiskum fíggjarligum váðum í Føroyum.

Bygnaður

§ 22. Føroya váðaráð er skipað við 5 limum og 5 varalimum.
Stk. 2. Løgmaður velur limir og varalimir í Føroya váðaráð eftir tilmælum frá myndugleikum, ið virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Limir verða valdir at sita í 4 ár og kunnu verða valdir aftur í mesta lagi 3 ferðir. Tá limur ikki hevur sitið í nevndini í eitt 4 ára skeið, kann hann tilmælast aftur á sama hátt sum aðrir limir. Limirnir verða valdir soleiðis:

1) Landsbanki Føroya tilmælir 2 limir og 2 varalimir, har annar skal vera landsbankastjórin og virkar sum formaður ella forkvinna. Hitt umboðið skal vera serfrøðingur á økinum.

2) Búskaparráðið tilmælir 1 lim og 1 varalim, ið skal vera óheftur serfrøðingur við servitan á økinum, og
3) landsstýrimaðurin tilmælir 2 limir og 2 varalimir við servitan umboðandi útinnandi valdið á økinum.

Myndugleikavirksemið hjá Føroya váðaráði

§ 23. Føroya váðaráð hevur sum uppgávu at:
1) eyðmerkja og hava eftirlit við fíggjarligum váða í Føroyum í síni heild,
2) bera fram eygberingar (observatiónir) viðvíkjandi váða í fíggjarkervinum,
3) koma við ávaringum um vaksandi váða í fíggjarkervinum, og
4) koma við tilmælum um átøk, ið kunnu minka ella byrgja fyri vaksandi váða í fíggjarkervinum.

Stk. 2. Ávaringar og tilmæli sambært stk. 1, nr. 3 og 4, verða latin viðkomandi útinnandi myndugleika og øðrum stovnum í Føroyum. Er talan um vantandi lóggávu ella broytingar í lóggávu á økinum verða ávaring og tilmæli givin útinnandi aðalráðum í Føroyum.
Stk. 3. Føroya váðaráð tekur avgerð um at lata frá sær eygberingar, ávaringar og tilmælir við vanligum meiriluta.
Stk. 4. Er talan um ávaringar ella tilmæli, vend móti útinnandi myndugleikum, kunnu umboðini fyri teir sambært § 22, stk. 2 ikki atkvøða, men skulu geva sína egnu frágreiðing um hesi viðurskifti.
Stk. 5. Eygberingar, ávaringar og tilmæli sambært stk. 1, nr. 2-4 skulu verða almannakunngjørd. Undantikið er ávaring ella tilmæli, ið mett verður kann hava neiliga ávirkan á fíggjarliga støðufestið. Ávaringin ella tilmælið er tá latið viðkomandi myndugleika í trúnaði og er ikki alment.
Stk. 6. Myndugleikar, ið fáa tilmæli frá Føroya váðaráð, skulu í seinasta lagi innan 3 mánaðir annaðhvørt fylgja tilmælinum ella skrivliga geva grundir fyri, hví tilmælið ikki verður fylgt.
Stk. 7. Myndugleikar og feløg skulu veita Føroya váðaráð viðkomandi upplýsingar, herundir upplýsingar fyri einstakar fíggjarstovnar o.a., veita viðkomandi skjøl o.a. eftir áheitan frá ráðnum, um so er, at Føroya váðaráð metir, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri virkisøkið.

§ 24. Landsbanki Føroya er skrivstova hjá Føroya váðaráði. Myndugleikar á økinum skulu vera við í arbeiðinum.

Kapittul 3
Revsing og gildiskoma

§ 25. Persónar o.o., nevnd í § 15, stk. 2, kunnu verða revsað við sekt, um tey ikki rættstundis lata Landsbanka Føroya umbidnu upplýsingarnar, ella við vilja ella av grovum ósketni lata Landsbanka Føroya skeivar ella villleiðandi upplýsingar.
Stk. 2. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsað sambært reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

§ 26. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017.
Stk. 2. §§ 2-5 koma í gildi 1. oktober 2016.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær kapittul 2 í lógini kemur í gildi. Kunngerðin skal vera lýst í seinasta lagi 1. juli 2017.
Stk. 4. Løgtingslóg nr. 140 frá 20. desember 2012 um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting fer úr gildi 1. januar 2017.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsøkir til uppskotið

Føroyar eru raktar av fleiri fíggjar- og búskaparkreppum seinastu áratíggini. Tær hava kostað samfelagnum, fólkinum og vinnuni nógv, bæði tá ið ræður um fíggjarlig virði, trivnað, sjálvbjargni og fólkatal. Stig verða nú tikin at fyribyrgja, at søgan endurtekur seg.

Seinasta fíggjarkreppan staðfesti, at fíggjarligu eftirlitsstovnarnir vóru ov veikir og høvdu eftirlit við ov avmarkaðum viðurskiftum. Úrslitið varð, at flestu lond styrktu yvirskipaða fíggjarliga eftirlitið í samfelagnum, og settu eisini á stovn tvørgangandi fíggjarlig váðaráð, ið skuldu tryggja, at ymsu eftirlitini innan búskapin og fíggjarøkið ikki bert hava eftirlit við einstøkum stovnum ella úrvaldum økjum, men skulu so hvørt gera váðametingar fyri alt fíggjarkervið og samfelagið fyri at fyribyrgja fíggjarkreppur í framtíðini og virka fyri at minka sveiggini í føroyska búskapinum.

Landsbanki Føroya verður tí settur á stovn saman við Føroya váðaráði við tí høvuðsendamáli at virka fyri fíggjarligum støðufesti. Harumframt skal Landsbanki Føroya virka sum óheftur, almennur fíggjarstovnur og greiningarstovnur og vera skrivstova hjá Føroya váðaráð. Føroya váðaráð verður stovnsett sum sokallaður makroprudentiellur myndugleiki í Føroyum.

Fíggjarligt støðufesti sum hugtak

Fíggjarligt støðufesti er breitt hugtak, men í høvuðsheitum snýr tað seg um, at fíggjarkervið í síni heild er somikið sterkt og mótstøðuført, at trupulleikar, ið stinga seg upp, ikki breiða seg ótálmaðir í skipanini, soleiðis at grundleggjandi tænastur til borgarar, fyritøkur og tað almenna verða órógvaðar. Álvarsligar fíggjarkreppur kunnu eisini hava ógvuliga neilig árin á búskapargongdina sum heild, og er seinasta fíggjarkreppan gott dømi um júst tað.

Systemiskir fíggjarváðar sum hugtak

At ein váði er systemiskur merkir, at talan er um ein veikleika ella eina ójavnváð í fíggjarskipanini, sum økir um vandan fyri, at ein systemisk fíggjarkreppa ger seg galdandi. Harumframt er talan um systemiskan váða, tá ið váðin ger seg galdandi breitt í allari fíggjarskipanini ella í einstøkum parti av skipanini, ið hevur avgerandi týdning fyri alla skipanina, t.d. ein einstakur SIFI-peningastovnur. Dømi um systemiskar fíggjarváðar kunnu vera “bústaðar-bløðrur” (samsvar er ikki millum prís og veruliga virðið), innlánsundirskot í peningstovnum, og savnan av kapitali á heilt fáum hondum. Tað er tí atburður hjá fíggjargeira og pørtum, ið hava stóra ávirkan á fíggjarkervið, undir einum og tess samband við realbúskapin, ið millum annað er týðandi at hava eyguni við í hesum sambandi.

Makroprudentiellur myndugleiki – yvirskipað eftirlit við fíggjarváðum

Ein Makroprudentiellur myndugleiki arbeiðir við at staðfesta vandar við støði í greiningum, sum skulu handhevjast við ítøkiligum stýringsamboðum, ið makroprudentiellur myndugleiki skal hava ábyrgd av at brúka mótvegis systemiskum váðum. Eisini skulu makroprudentiel politisk initiativ hava atlit at mikro-prudentilum initiativum umframt penga- og fíggjarpolitisku økini. Eitt dømi um arbeiðið hjá einum makroprudentiellum myndugleika, t.d. váðaráðnum, kundi verið, at tá ið stórur útlánsvøkstur rakar búskapin, kann váðaráðið mæla til, at myndugleikarnir økja um kapitalkrøvini til peningastovnarnar, fyri soleiðis at tálma útlánsvøkstrinum.

Seinastu 5-6 árini er í altjóða samstarvsfelagsskapum og í einstøkum londum farin fram ein sjálvrannsakan, og spurningur er settur við, hví regluverk og avvarðandi eftirlitsstovnar og politiskir myndugleikar ikki nóg væl og nóg tíðliga varnaðust viðurskifti og vandar, ið fingu fíggjarkervið at

rilla og fyri ein part fara fyri bakka. Ein týðandi niðurstøða hevur verið, at skipanin við einstøkum stovnum, m.a. fíggjareftirliti (mikro-eftirlit) og tjóðbanka (pengapolitiskur myndugleiki), ið hvør sær arbeiddu fyri fíggjarligum støðufesti, í ov lítlan mun megnaðu at avdúka systemiskar váðar, sum vóru atvoldin til fíggjarkreppuna. Semja er um, at neyðugt verður at menna regluverk, myndugleikar og amboð, sum betur kunnu meta um og hava møguleika at handfara systemiskar váðar. Í høvuðsheitum verður hetta gjørt við at stovna og menna tað makroprudentiella myndugleikaøkið.

Makroprudentiella málsøkið er nýtt málsøki, ið hevur tikið seg upp eftir fíggjarkreppuna, ið tók dik á seg í 2008. Málsøkið fevnir um yvirskipað eftirlit við systemiskum fíggjarligum váðum í øllum samfelagnum – alt frá bústaðarmarknaði, pensjónsfeløgum, tryggingarfeløgum, peningastovnum, realkredittfeløgum og størri fyritøkum v.m. Sambært viðmerkingum í løgtingslóg nr. 79 frá 12. mai 2005 eru nýggj málsøki undir føroyskum málsræði.

Minka sveiggini í búskapinum

Eins og aðrir er føroyski búskapurin sermerktur við egnum avbjóðingum og sveiggjum. Talan er um lutfalsligan lítlan búskap, har náttúrugivna tilfeingið í sjónum framvegis hevur stóra ávirkan á búskaparligu sveiggini (business cycles). Søguliga sæð og afturlítandi kann staðfestast, nær tindar í fíggjarligu ringrásini (financiel cycles) hava víst seg. Avbjóðingin fyri makroprudentiella myndugleikan er til eina og hvørja tíð at kenna fíggjarligu ringrásina og hava amboð tøk at javna út fíggjarligu sveiggini. Hvørki tey meira kendu realbúskaparligu sveiggini ella minni kenda fíggjarliga ringrásin í Føroyum líkjast ella fylgja gongdini í Danmark.

Skipa tvørgangandi yvirskipað eftirlit við fíggjarligu váðunum í Føroyum

Føroyar hava fulla ábyrgd av stórum parti av fíggjargeiranum, nevnliga pensjón, trygging og realkredittøkinum, men bankarnir eru framhaldandi undir donskum ræði.

Tørvur er á einum føroyskum váðaráði umboðandi teir myndugleikar, ið virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum í samsvari við altjóða tilmæli.

Neyðugt er við eftirliti tvørtur um ymisku partarnar í fíggjargeiranum, eitt nú vinnurekandi grunnar og bankar. Løgtingið setti í verk eina §19 kanning í kjalarvørrinum á kreppuni, og tilmælið var, at ymsu eftirlitini ikki eiga at virka undir ymiskum myndugleikum. Eitt føroyskt váðaráð, ið verður makroprudentiellur myndugleiki í Føroyum, tryggjar, at umboð fyri allar partar, ið hava við føroyska fíggjargeiran at gera, so hvørt meta um samlaða systemiska fíggjarváðan í Føroyum.

Stóru peningastovnarnir í Føroyum eru alsamt ein váði fyri føroyska búskapin. Eisini vaksa pensjónsuppsparingarnar í Føroyum nógv næstu árini. Mett verður, at samlaða pensjónsuppsparingin í Føroyum kemur upp í 15-20 mia. kr., um øll koma upp í 15% uppsparing av lønini sambært galdandi eftirlønarlóg. Eisini eru samtøk í føroyska fíggjargeiranum, ið hava virksemi tvørtur um fleiri virkisøki, eitt nú pensjón, trygging og banka. Tilfeingisvinnurnar og stóru fyritøkurnar, ið virka innan tær, hava eisini alstóran týdning fyri búskapin. Samstundis er almenni búskapurin merktur av, at stórar avbjóðingar eru við langtíðar haldførinum. Øll hesi viðurskifti kunnu ávirka fíggjarliga støðufestið. Neyðugt er at miðsavna vitan innan øll týðandi fíggjarøki í einum føroyskum váðaráði fyri á tann hátt at fyribyrgja systemiskum váða.

Landsbanki Føroya – fíggjarligur greiningarstovnur og almennur fíggjarstovnur

Eitt virkisført váðaráð hevur tørv á, at neyðugir førleikar og neyðugar heimildir áhaldandi eru til taks til útinnandi greiningararbeiðið. Tí skal Landsbanki Føroya virka sum greiningarstovnur við væl útgreinaðum hagtalsheimildum.

Landsbankin verður eisini almennur fíggjarstovnur. Umframt at umsita ogn og skuld landsins kann landsbankin eisini verða fíggjarstovnur hjá kommunum og almennum grunnum.

Landsbankin kann haraftrat veita ráðgeving um fíggjarviðurskifti. Ætlanin er, at landið, kommunurnar og almennir grunnar kunnu leita sær ráðgeving hjá Landsbanka Føroya. Tað er avgjørt ein fyrimunur í einum lítlum samfelag sum okkara, at servitan innan fíggjarøkið verður savnað á einum staði soleiðis, at eitt nú kommunur kunnu leita sær ráðgeving hjá einum óheftum stovni, ið tænir øllum borgarum í Føroyum.

1.2. Galdandi lóggáva

Ásetingarnar um røkt av landsins gjaldføri og skuld standa í løgtingslóg um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting frá 20. desember 2012. Ásetingarnar verða nú skrivaðar inn í nýggju landsbankalógina, og lógin um landsins gjaldføris- og skuldarumsiting verður sett úr gildi. Frameftir verður tað sostatt nevnd landsbankans, ið røkir uppgávurnar, ið nú verða røktar av Gjaldstovuráðnum.

Løgtingslóg um tryggingarvirksemi frá 9. juni 2008, er løgfrøðiligi karmurin um tryggingar- og pensjónsfyritøkurnar í Føroyum. Lóggávan er føroysk, men lógin sjálv er í stóran mun avritað av donsku lógini um fíggjarligt virksemi, "lov om finansiel virksomhed", sum í Danmark umfatar bæði banka- og tryggingarvirksemi. Í hesi lóg er ásett, at Tryggingareftirlitið er eftirlitsmyndugleikin á tryggingar- og pensjónsøkinum í Føroyum.

Lov om finansiel virksomhed er løgfrøðiligi karmurin um bankavirksemi í Føroyum. Lógin er sett í gildi fyri Føroyar við ríkislógartilmæli og verður javnan dagførd. Í hesi lóg er ásett, at danska fíggjareftirlitið er eftirlitsmyndugleikin hjá føroysku peningastovnunum. Í lógini er eisini ásett, at Det Systemiske Risikoråd, sum er danska váðaráðið, virkar í Føroyum, bæði á peningastovns-, tryggingar- og pensjónsøkinum. Føroyska tryggingarlóggávan er tó ikki broytt samsvarandi.

Tí hevur Det Systemiske Risikoråd í Føroyum bert heimildir innan føroysku peningastovnarnar. Støðan í dag er tí tann, at Føroyar ikki hava nakað fíggjarligt váðaráð, ið livir upp til altjóða krøv. Det Systemiske Risikoråd fevnir um danska samfelagið umframt føroysku peningastovnarnar, meðan Føroyar ikki hava nakað váðaráð, ið fevnir um alt tað føroyska samfelagið og føroyska fíggjargeiran sum heild. Føroya váðaráð skal tryggja, at Føroyar fáa eitt váðaráð, ið fevnir um alt fíggjarøkið og alt samfelagið, tá umræður systemiskar fíggjarligar váðar.

Fylgibroytingar verða eisini gjørdar í lóg um Búskapargrunn Føroya og lóg um AMEG, har ásett verður, at Landsbanki Føroya umsitur teir.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at styrkja samlaðu skipanina, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti. Við nýggjum føroyskum stovnum á økinum, ið hava sterkar heimildir og betri innlit í føroysk viðurskifti í mun til verandi skipan, verður arbeiði við fíggjarligum støðufesti raðfest munandi hægri. Sannlíkindini fyri, at føroyski búskapurin, ið er føroyskt ábyrgdarøki, endar í fíggjar- og búskaparkreppu, verða hervið minni.

Arbeiðsført føroyskt váðaráð verður stovnsett, umboðandi viðkomandi virkandi føroyskar myndugleikar, har fortreytin fyri stovnanini er, at fakligi og óhefti greiningarstovnurin (Landsbanki

Føroya) verður stovnsettur samstundis og fær leiðslu og skrivarauppgávu (saman við viðkomandi myndugleikum) í ráðnum um hendi.

Av tí, at fíggjarøkið og ábyrgdin av eftirliti við tí fyri ein part er í Føroyum og fyri ein part í Danmark, gerst tørvurin á einum føroyskum váðaráði, ið hevur umboð fyri allar myndugleikar, ið virka innan fíggjarváða, uppaftur størri. Tí tað er skjótt, at yvirlit ikki fæst yvir samlaða fíggjarliga váðan, um eftirlitini bara arbeiða hvør sær. Í fyrsta umfari fara umboð, ið umboða Landsbankan, Búskaparráðið og útinnandi eftirlitspartarnar í Føroyum, Tryggingareftirlit og Skrásetingareftirlit, at vera partar av føroyska váðaráðnum. Føroyar hava ikki tikið ábyrgdina heim av fíggjareftirliti við bankunum enn. Tí er samskifti millum føroyskar og danskar myndugleikar um, at Finanstilsynet veitir Føroya váðaráð upplýsingar um systemiskar váðar viðvíkjandi føroysku bankunum og føroyska bankakervinum. Sama hvør niðurstøðan av tí er, so fara MFI-hagtøl fyri føroysku bankarnar, saman við roknskapum, heimildum at fáa til vega upplýsingar, leypandi greiningum av fíggjarváðum í Landsbankanum og tvørgangandi samstarvi í føroyska váðaráðnum, í stóran mun at styrkja yvirskipaða eftirlitið við fíggjarligum váða í Føroyum. Tað verður aftur við til at fyribyrgja framtíðar fíggjarkreppur og nógv betur tryggja fíggjarligt støðufesti í Føroyum.

Fyri at tryggja best møguligt arbeiðsføri er neyðugt við nøktandi heimildum til hagtøl og vitan og tilluting av amboðum, so uppgávan at greina og staðfesta systemiskar váðar í føroyska búskapinum kann verða loyst á nøktandi hátt. Tað fer henda lóggáva at tryggja nýggja Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráði.

1.4. Hoyring

Fíggjarmálaráðið hevur í arbeiðinum við at skipa karmarnar um nýggja Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráð arbeitt saman við umboðum frá Gjaldstovu Føroya, Hagstovu Føroya og TAKS.

Skipað hevur eisini verið fyri fleiri hoyringarfundum, har m.a. hesir partar eru kunnaðir:

- Gjaldstovuráðið
- AMEG (Samhaldsfasti)
- Samtak og Fakfelagssamstarvið
- Arbeiðsgevarafelagið
- Felagið Peningastovnar

Eisini er Kommunufelagið kunnað um møguleikan, ið uppskotið gevur kommunum.

Síðan er uppskotið lagt til almenna hoyring. Fíggjarmálaráðið hevur sent út tíðindaskriv, har kunnað verður um, at uppskotið er tøkt á almenna hoyringsportalinum hjá landsstýrinum: www.foroyalandsstyri.fo/landsstyrid/uppskot-til-ummaelis/

Uppskotið er eisini og sent danska Vinnu- og vakstrarmálaráðnum til viðmerkingar.

Hoyringssvar eru komin frá Vinnuhúsinum, Hagstovuni, Fakfelagssamstarvinum og Felagnum Føroyskir Peningastovnar. Harafturat eru viðmerkingar komnar frá danska Vinnu- og vakstrarmálaráðnum.

Vinnuhúsið og Felagið Føroyskir Peningastovnar vísa á, at uppskotið kann ávirka kappingarstøðuna á privata fíggingarmarknaðinum.

Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar.
Landsbankin fer bert at kunna umsita ogn og skuld hjá landi, kommunum og almennum grunnum. Hetta eru partar, ið veita almennar tænastur til landsins borgarar. Hetta kann lætta um umsitingarliga og fíggjarliga hjá tí almenna sum heild. Landsbankin fer ikki at kappast á fíggjarmarknaðinum um privatar kundar.

Vinnuhúsið vísir somuleiðis á, at spurningur kann setast við, hvørt rætt er at fíggja landsbankan á fíggjarlóg.

Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar.
Tillaging er gjørd, har inntøkur landsbankans frá umsiting av gjaldføri og skuld landsins nú eru ásettar beinleiðis í lógini, heldur enn at vera heftar at avtalu millum landsstýrið og landsbankan, hetta fyri at styrkja óheftnið.

Fakfelagssamstarvið tekur undir við, at Landsbanki Føroya verður endurstovnaður og tekur undir við ætlanini um at stovna Føroya váðaráð.

Hagstova Føroya vísir á, at umráðandi er, at Hagstovan frameftir eisini heldur seg til leiðreglurnar hjá ST um, at upplýsingar, sum Hagstovan fær við heimild í lóg, verða ikki latnar út aftur uttan sum viðgjørd hagtøl.

Fíggjarmálaráðið hevur hesa viðmerking.
Hædd er tikin fyri hesum í serligu viðmerkingunum til §15.

Danska Vinnu- og vakstrarmálaráðið metir, at lógaruppskotið ikki er í samsvari við verandi myndugleikabýti millum Føroyar og Danmark. Mælt verður til at broyta uppskotið soleiðis, at Føroya váðaráð einans fær heimildir innan tryggingar-, pensjóns- og realkreditt økini, ið eru undir føroyskum málsræði. Ásetingarnar eiga sostatt ikki at snúgva seg um føroyskar peningastovanr, sum eru undir donskum málsræði og eigur hetta eisini at standa í viðmerkingunum til lógina. Eisini verður gjørt vart við, at neyðugt er at samráðast víðari um viðurskiftini, tá fyritøkur (peningastovnar) lata upplýsingar til Føroya váðaráð.

Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar.
Virkisøkið hjá føroyska váðaráðnum er at meta sum eitt nýtt málsøki, nevniliga makroprudentiella politikkøkið, og hava føroyskir myndugleikar rætt at lóggeva á hesum øki. Tað eru bert umboð fyri føroyskar myndugleikar í Føroya váðaráði og ávaringar og tilmælir frá ráðnum verða i fyrstu syftu einans lætnar føroyskum myndugleikum. Arbeitt verður fram ímóti at fáa samstarv við danska fíggjareftirlitið um upplýsingar, ið kunnu stuðla undir arbeiðið hjá Føroya váðaráði við at eyðmerkja og hava eftirlit við systemiskum fíggjarligum váðum í Føroyum.
Ásetingin í lógini um, at fyritøkur og myndugleikar í Føroyum skulu lata Føroya váðaráði viðkomandi upplýsingar, er alneyðug, um Føroya váðaráð skal megna at loysa uppgávuna at eyðmerkja og hava eftirlit við systemiskum váðum í Føroyum.

Síðani hoyringssvarini eru innkomin, er bygnaðurin á lógaruppskotinum broyttur.
Eisini er nú ásett, at varalimur skulu veljast fyri umboðini í ávikavist landsbankanevndini og váðaráðnum, og at nevndarlimir ikki kunnu veljast aftur í eitt samanhangandi longri tíðarskeið enn 12 ár.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Landið rindar sambært lógaruppskotinum 4 promillu av ásetta minsta gjaldførinum fyri umsiting av skuld og gjaldføri landsins. Minstagjaldføri landsins er ásett at vera 15% av BTÚ, og er hetta í løtuni ásett at vera 2,3 mia. kr.
4 promillu av hesum svara til 9,2 mió. kr. Játtanin er flyting av játtan frá Gjaldstovu Føroya og Hagstovu Føroya, vegna fluttu uppgávurnar til Landsbanka Føroya, umframt uppraðfesting í § 3 á fíggjarlógini. Í játtanarkørmunum fyri 2017 er lagt upp fyri virksemi Landsbankans alt árið.
Ætlanin er, at nýggi Landsbanki Føroya, tá ið hann verður stovnaður, skal kosta áleið tað sama sum landsbankin kostaði, áðrenn hann varð avtikin í 2013.
Afturat inntøku av minstagjaldføri kann landsbankin hava inntøkufíggjað virksemi, eitt nú gjøld frá kommunum og almennum grunnum, ið nýta Landsbanka Føroya til ognar- og skuldarumsiting.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Landsbanki Føroya verður óheftur almennur fíggjarstovnur, ið ger tað møguligt hjá øllum tí almenna geiranum at savna vitan og førleikar innan fíggjarliga økið, herundir gjaldføris- og skuldarrøkt, á einum og sama staði. Tað kann styrkja ráðgevingina og umsitingarliga lætta um, tá ið neyðugt ikki er at byggja upp vitan og førleikar fleiri staðni.
Við umskipanini verður virksemið hjá Fígging Landsins, sum nú er partur av Gjaldstovuni, flutt til Landsbanka Føroya. Partur av virkseminum hjá Hagstovuni verður eisini flutt í nýggja Landsbankan. Játtan flytur við, og starvsfólk kunnu flyta við.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Landsbanki Føroya gevur kommunum og almennum grunnum o.ø. møguleika at nýta landsbankan til gjaldføris- og skuldarumsiting. Uppskotið kann ávirka virksemið hjá privatu bankunum nakað. Hetta ger seg galdandi, um eitt nú almennir grunnar og kommunur velja at nýta Landsbanka Føroya til ognar- og skuldarfyrisiting.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Lógaruppskotið fevnir ikki um millumtjóða sáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Lógaruppskotið sampakkar við evropiska mannarættindasáttmálan og sáttmálan hjá Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum.

2.9. Marknaðarforðingar
Mett verður ikki, at uppskotið kann elva til marknaðarforðingar.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur stór inntriv
Persónar kunnu verða sektaðir við bót, lata teir ikki Landsbanka Føroya umbidnar upplýsingar rættstundis. Mál viðvíkjandi broti á hesar reglur verða viðgjørd sum løgreglumál.

2.11. Skattur og avgjøld
Ongar ásetingar eru um skatt ella avgjøld í uppskotinum.

2.12. Gjøld
Uppskotið áleggur ikki gjøld á einstaklingar ella fyritøkur.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Landsbanki Føroya kann við ávísari freist biðja løgfrøðiligar og likamligar persónar lata upplýsingar, ið viðkomandi hevur um hendi, og sum eru neyðugir fyri virkisøkið hjá Landsbanka Føroya.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Landsbanki Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, ið virkar óheftur av politisku skipanini.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Sosialar avleiðingar		Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Landsbanki Føroya er sjálvstøðug løgfrøðilig eind sambært ásetingunum í hesi lóg. Høvuðsendamálið hjá Landsbanka Føroya er at virka fyri fíggjarligum støðufesti. Arbeiðið á stovninum snýr seg um almenna skuldar- og gjaldførisumsiting, fíggjarliga ráðgeving, og hartil í stóran mun, at fáa fíggjarligar váðar í føroyska búskapinum í ljósmála og gera vart við teir. Sum greiningarstovnur framleiðir Landsbanki Føroya tilfar, sum er til gagns hjá teimum, ið taka avgerðir, ið kunnu ávirka fíggarliga støðufestið í Føroyum. Landsbanki Føroya verður skrivstova hjá Føroya váðaráð.

Til § 2

Nevnd landsbankans er saman við stjóranum ovasti myndugleiki í Landsbanka Føroya og fær ta uppgávu at gera reglur fyri virksemið hjá nevnd og stjóra. Eisini liggur tað á nevndini at gera ásetingar fyri, hvussu gjaldførið hjá landinum og skuld landsins verða umsitin. Nevndin átekur sær sostatt tær uppgávur, ið higartil hava verið røktar av gjaldstovuráðnum.

Stk. 5. Persónar, ið javnan kunnu væntast at verða ógegnigir í málsviðgerðini hjá nevndini eftir reglunum í kapitli 2 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg, kunnu ikki vera limir í nevndini.
Stk. 6. Nevndin skipar seg sjálv, við forkvinnu/-manni og næst forkvinnu/-manni.

Landsstýrismaðurin tilnevnir limirnar eftir tilmæli frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Fróðskaparsetri Føroya, arbeiðsgevarafelagnum, fakfeløgum og Kommunufelagnum. Tá ið fakfeløgini ikki hava eitt meginfelag, verður tað upp til hesi at samskipa og semjast um 1 lim og 1 varalim, sum tey tilmæla til landsstýrismannin í fíggjarmálum. Mælt verður til, at limirnir í nevndini skulu hava fakligar førleikar innan eitt ella fleiri av hesum førleikaøkjum: búskaparfrøði, fígging og kredittmeting, serligt innlit í føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum. Nevndarlimirnir skulu samanlagt fevna um allar hesar førleikar. Um so er, at tey innstillaðu ikki hava nøktandi ella nóg breiðan fakligan førleika, kann landsstýrismaðurin biðja um nýggj tilmæli.

Stk. 7. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum evsti ábyrgdarhavandi fyri gjaldføri og skuld landsins, hevur rætt at møta á nevndarfundum sum eygleiðari. Hetta er samsvarandi áseting sum í fyrrverandi landsbankalógini.

Til § 3

Tað er nevndin, sum setir og loysir stjóran úr starvi. Tað er ikki tíðaravmarking á, hvussu leingi ein stjóri kann sita, men nevndin metir alla tíðina um førleikar stjórans.

Til § 4

Nevndin røkir tær í § 4 nevndu uppgávur.

Til § 5

Tað áliggur nevndini at tryggja, at Landsbanki Føroya fylgir almennum reglum, sum eru galdandi fyri almennar stovnar, til dømis at áseta løn og nevndarsamsýningar og lóg um alment innlit.

Til § 6
Landsbanki Føroya skal virka sum fíggjarstovnur hjá landinum. Tað merkir, at Landsbankin fyrisitur gjaldførið hjá landinum, og tað er Landsbankin, sum røkir skuldina hjá landinum.
Kommunur og almennir grunnar kunnu eisini brúka landsbankan sum fíggjarstovn. Tað merkir, at Landsbankin kann átaka sær at røkja ogn og skuld hjá kommunum og almennum grunnum.

Til § 7
Her verður ásett, at tað er Landsbanki Føroya, sum hevur uppgávuna at røkja gjaldførið og skuldina hjá landinum eftir nærri áseting í hesi lóg og eftir nærri áseting frá nevndini í Landsbanka Føroya. Tað merkir, at nevndin ger yvirskipaðar meginreglur fyri umsitingina, sum Landsbankin so í sínum dagliga yrki fylgir sambært hesi lóg.

Til § 8

Við hesum fær Landsbanki Føroya heimild at taka upp lán í Føroyum og uttanlands. Í § 6 verður staðfest, at kommunur og almennir grunnar eisini kunnu nýta landsbankan. Tað ber í sær, at landsbankin skal hava møguleika millum annað eisini at veita teimum lán.

Til § 9

§ 9 ásetir, at landsbankin kann vera fíggjarstovnur hjá landi, kommunum og almennum grunnum. Landsbankin virkar sum fíggjarstovnur hjá landinum, men kommunur og almennir grunnar kunnu velja, hvørt Landsbankin skal umsita teirra ogn (gjaldføri) og skuld. Stjórin fyrireikar tey mál, sum avgerð verður tikin um. Avtala verður síðan gjørd millum Landsbankan og viðkomandi part um, hvussu ogn og skuld skulu umsitast.

Til § 10

Umsitingin av landsins gjaldføri hevur, sum greinin vísir á, fleiri endamál. Eitt endamál er altíð at hava neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at landið kann halda sínar skyldur. Neyðugt gjaldføri er í hesum føri 15% av BTÚ í undanfarna ári, eisini kallað minstagjaldføri, sí § 11, stk. 1.

Tøkt gjaldføri verður tulkað sum kontantur peningur (kassapeningur), peningur á bók í peningastovni, kassakredittir og lætt umsetilig virðisbrøv, har lætt umsetilig virðisbrøv eru skrásett á einum keypsskála (lógarreguleraðum fondsbørsi). Peningur, sum er bundin í fasta ogn, í bilar og veðsettur, er ikki í hesum føri tøkur peningur.

Ætlanin við gjaldførinum er, at landið altíð hevur tøkan pening at rinda sínar skyldur ½ ár fram, og sostatt megnar at rinda fyri rakstur og lánsgjøld.

At gjaldførið verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika merkir, at serliga stór atlit skulu takast at, at gjaldførið er tøkt, sí omanfyri, tá og um tað við løgtingslóg, løgtingsfiggjarlóg ella løgtingseykafíggjarlóg verður tikin avgerð um nýtslu av landsins gjaldføri. Men eisini, at atlit skulu

takast til, at teir mótpartar, har landskassans peningur verður ílagdur (plaseraður), við stórari vissu kunnu rindast rættstundist aftur - mótpartsváðin.
Mótpartsváði er váðin fyri, at mótparturin í eini avtalu ikki megnar at halda tað, sum er avtalað, ella at aktivið ikki kann avhendast uttan tapsváða.

At samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin skal vera sum minst merkir, at gjaldførið í peningastovnum, lánsbrævaútgevarum o.ø., ið kunnu væntast at verða serliga hart raktir, um illa gongst í føroyska búskapinum, verður ikki meira enn neyðugt er til vanliga raksturin av landinum.
At landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor merkir, at miðað verður eftir at fáa so stórt avkast sum møguligt innan fyri givnar íløgurammur, sum nevndin ásetir út frá hesi lóg. Alment eigur at verða stýrt eftir at minka um váðan við at nýta diversifikatión, tá ið virðisbrøv verða keypt.

Í §10, stk. 3 er allýsing av "landsins gjaldføri" eftir hesi lóg. Talan er um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum o.ø., ið fevnd eru av § 2, stk. 1 í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald. Í stuttum er "landsins gjaldføri" gjaldførið hjá stovnum o.ø., hvørs rakstrarræltan er við á løgtingsfíggjarlóg, løgtingseykajáttan ella løgtingseykafíggjarlóg. Eftir ásetingini telur gjaldførið hjá teimum grunnum, feløgum o.ø., ið ikki eru tikin við á fíggjarlógini, men sum landið eigur, sostatt ikki við í "landsins gjaldføri" eftir hesi lóg. Hetta avmarkar sjálvandi ikki landsins ognarrætt til slíkar grunnar, feløg o.a., men avmarkar hetta einans, hvat kann teljast við í gjaldførisuppgerðina eftir hesi lóg.

Stk. 4 nágreinar, hvat slag av fíggjarognum telja við í landsins gjaldførisuppgerð eftir hesi lóg. Tað er kassapeningur, innistandandi í peningastovnum, ótrektir kredittir í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir. Ella við øðrum orðum
Landsins gjaldføri er:
Lætt umsetilig fíggjarogn, t.e. kassapeningur og peningur á bók í peningastovni
+ trekningsrættur
+ virðisbrøv
– veðsett fíggjarogn (virðisbrøv o.a.)
= landsins gjaldføri

Til § 11

Landsins gjaldføri sambært § 11, stk. 1 skal í minsta lagi samsvara við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Minstagjaldið er við til at tryggja, at landsstýrið fær eitt skotbrá at tillaga búskapin í kreppustøðu, og at landskassin altíð hevur pening til at rinda næsta lánsafturgjald, og gevur tí ein betri smidleika í sambandi við lántøku.

Sambært stk. 2 er tað nevndin í landsbankanum, ið nágreinar, júst hvør upphædd samsvarar við 15% av BTÚ. Tað er Hagstovan sum ger BTÚ upp. Tað er ikki altíð, at BTÚ fyri undanfarna árið er greitt, tá ið upphæddin fyri minstagjaldføri verður ásett í august. Um so er, verður síðst uppgjørda talið fyri BTÚ hjá Hagstovuni brúkt, eisini um talan er um eina fyribils uppgerð.

Landsbankin hevur eftirlit við, um landsstýrið megnar at liva upp til krøvini um, at landsins gjaldføri í minsta lagi er 15% av BTÚ. Vísir eftirlitið, at ábendingar eru um, at gjaldførið ikki er 15% av BTÚ, hevur nevndin sambært stk. 3 skyldu til at gera eitt tilmæli til landsstýrismannin í fíggjarmálum um at økja um gjaldførið. Hetta verður gjørt í sambandi við næstu lántøku.

Stk 3. Greinin gevur heimild at brúka av landsins gjaldføri. Landsbankin hevur eftirlit við, um landsstýrið megnar at liva upp til krøvini um, at landsins gjaldføri í minsta lagi er 15% av BTÚ. Vísir eftirlitið, at gjaldførið ikki er 15% av BTÚ, skal landsbankin mæla landsstýrismanninum til at taka ta upphædd í láni, sum krevst, fyri at fáa gjaldførið aftur upp á 15% av BTÚ. Tað verður gjørt í sambandi við næstu lántøku.

Ásetingin í stk 3 skal millum annað tryggja, at Landsbankin (saman við Gjaldstovuni) alla tíðina hevur yvirlit yvir kontur hjá landsstovnum og harvið landsins gjaldføri. Ásetingin forðar eisini fyri, at stovnar taka upp kassakredittir uttan samráð við Landsbankan. Og ásetingin tryggjar, at Landsbankin ræður yvir tøka gjaldførinum hjá stovnunum.

Stk. 4 ásetir, at ikki er loyvt hjá landsstovnum at plasera pening, taka upp kredittir, brúka fíggjarlig amboð og annað. Hetta virksemið er miðsavnað í Landsbankanum.

Til § 12

Nevnd Landsbankans ger eina íløgustrategi, sum umsitingin fylgir. Íløgustrategiin er almenn, og kann eitt nú verða løgd út á heimasíðuna hjá Landsbanka Føroya.

Til § 13

Greinin vísir á, at tað er nevndin í Landsbankanum, sum ger ásetingarnar um landsins lántøku, men Landsbankin fyrisitur lántøkur eftir hesum ásetingum. Tað merkir, at tað er Landsbankin, ið hevur beinleiðis fyrisitingarligu ábyrgdina av landsins lántøku, herundir at gera kunningartilfar o.a. til íleggjarar.

Stk. 2 ásetir, at lántøka einans kann fremjast við undirskrift frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Tað merkir, at nevndin í landsbankanum ikki hevur heimild at binda landið til lántøku, men at landsbankin einans fyrisitur landsins lántøku. Hetta er í samsvari við stýrisskipanarlóg, ið ásetir, at landið bara kann taka upp lán, um heimild er í løgtingslóg. Stk. 2 staðfestir, at løgtingslógarheimild er fyritreyt fyri lántøku.

Í løgtingslóg nr 116 frá 20. desember 1991 um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum er ein standandi lóg um upptøku av lánum til landskassan og fyri at endurfíggja landskassalán. Landsstýrismaðurin skal geva heimild til at økja skuldina.

Stk. 4 ásetir, at Landsbankin fyrisitur tey lán, ið landið hevur tikið, og at henda fyrisiting fer fram eftir boðum frá nevndini í bankanum.

Stk. 5 heimilar Landsbankanum at vera almennur lánimyndugleiki hjá øðrum almennum myndugleikum enn landinum.

Til § 14

Greiningarvirksemið hjá landsbankanum snýr seg í høvuðsheitum um at gera fíggjarligar váðagreiningar, t.e. at meta um váðamyndina í fíggjargeiranum, í almenna búskapinum og búskapinum í síni heild.

Landsbankin verður skrivstova hjá Føroya váðaráði og fer soleiðis at hava ábyrgd av dagligu hagtalsframleiðsluni og greiningunum til váðaráði. Greiningararbeiðið fevnir um at menna og brúka myndlar til greiningar av váða í fíggjarkervinum. Her kann talan t.d. verða um sokallaðar "stress tests," har kannað verður, hvussu mótstøðuførar fíggjarfyritøkur eru, tá ið álvarsligir stoytir raka. Eisini fatar greiningarvirksemið um, at fylgt verður neyvt við gongdini á fíggjarmarknaðum. Viðurskifti, ið hava týdning fyri fíggjarliga støðufestið í Føroyum, verða áhaldandi greinað soleiðis, at váðaráðið hevur best møguligar fyritreytir at eyðmerkja systemiskan váða.

Til § 15

Ásetingin er grundarlag undir kørmunum hjá Landsbanka Føroya viðvíkjandi hagtalsvirksemi. Ásetingin heimilar Landsbanka Føroya at savna saman og viðgera upplýsingar til at almannakunngera hagtøl um fíggjarlig viðurskifti, og upplýsingarnar kunnu brúkast til annað virksemi hjá Landsbanka Føroya.

Tey, sum eru fevnd av skylduni at lata Landsbanka Føroya upplýsingar, eru øll tey, sum eru nevnd í lógini, herundir løgfrøðiligir og likamligir persónar, landsstovnar, grunnar, almenn partafeløg, kommunur og kommunal feløg o.o. Mett verður, at neyðugt er, at Landsbanki Føroya fær heimild at seta eina freist fyri tey, sum skulu lata upplýsingar. Heimildin til at biðja um upplýsingar er víð og fevnir um allar upplýsingar, sum Landsbanki Føroya metir vera neyðugar fyri virkisøkið hjá Landsbanka Føroya.

Ásetingin gevur Landsbanka Føroya heimild at biðja um upplýsingar frá feløgum og privatpersónum, ið hava heimstað í Føroyum, og sum virka sum fíggjar- og tryggingarstovnar og annað virksemi. Eisini fevnir heimildin um feløg og privatpersónar, sum hava givið út ella eiga virðisbrøv, ella sum skipa handil við ella clearing og avgreiðslu av fíggjaramboðum. Deildir og/ella dótturfeløg o.tíl. hjá fíggjarstovnum í Føroyum, ið ikki koma undir at vera løgfrøðiligur ella likamligur persónur, men sum annars koma undir allýsingar í § 15, stk. 2, nr. 1-3, hava eisini skyldu at lata Landsbanka Føroya upplýsingar.

Hagtalsheimildin er lík hagtalsheimildini, ið danski tjóðbankin hevur í Føroyum, tó fevnir heimildin hjá landsbankanum eisini um atgongd til upplýsingar frá øðrum løgfrøðiligum og likamligum persónum enn fíggjarstovnum.

Hagstova Føroya er undantikin krøvunum um at veita Landsbanka Føroya atgongd til upplýsingar, sum Hagstova Føroya hevur fingið frá borgarum, myndugleikum, stovnum og fyritøkum, sambært lóg um Hagstovu Føroya og altjóða reglum um hagtalsvirksemi.

Til § 16

Ásetingin gevur Landsbanka Føroya heimild at lata víðari allar upplýsingar, herundir eisini trúnaðarupplýsingar í tann mun og við tí nágreinan, ið er neyðug fyri at útinna virkisøkið, til Føroya váðaráð, eins og til aðrar myndugleikar, ið virka fyri fíggjarligum støðufesti.

Ásetingin um, at Landsbanki Føroya kann lata víðari allar upplýsingar, eisini trúnaðarupplýsingar, gongur fram um § 29 í fyrisitingarlógini, sum ásetir, at: "Trúnaðarupplýsingar, sum einans eru

fingnar fyri at gera hagfrøðiligar úrdráttir ella sum liður í vísindaligari kanning, kunnu ikki latast víðari til ein fyrisitingarmyndugleika til aðra nýtslu."

Til § 17

Fíggjarliga virksemið hjá Landsbanka Føroya merkir, at landsbankin átekur sær ávísan váða. Eitt nú í mun til gjaldførisumsiting við aðrar partar enn landið. Fyri at tryggja óheftni landsbankans og geva landsbankanum møguleika at fremja virksemi sítt, er neyðugt við fæi, ið kann nýtast at javna inntøkur og útreiðslur landsbankans. Nevndin skal gera reglur, ið áseta, hvussu javningin av inntøkum og útreiðslum landsbankans verður framd.

Til § 18

Tað er týðandi fyri óheftni landsbankans, at inntøkur landsbankans liggja í tryggari legu. Landsbankin verður tikin við á játtanarlóg við rakstrarjáttan. Fyri umsitingina av landsins gjaldføri og skuld fær landsbankin 4 promillu av gjaldførinum, sum er allýst í § 11, stk. 2. Fyri 2016 er minsta gjaldførið 2,3 mia. kr. 4 promillu av hesum samsvara við inntøku á 9,2 mió. kr. Upphæddin verður flutt av játtanini fyri rentuinntøkur landsins. Við at fastleggja inntøkur stovnsins við lóg kemur landsbankin at vera óheftur. Landsbankin kann eisini krevja gjøld frá teimum almennu eindunum, ið nýta hann til ognar- og skuldarumsiting og til ráðgeving.

Til § 19
Landsgrannskoðarin grannskoðar Landsbankan. Landsgrannskoðarin kann útveita grannskoðanina ella partar av henni til skikkaðar privatar grannskoðarar.

Til § 20
Sum almennur stovnur er Landsbanki Føroya undantikin øllum skattum og avgjøldum.

Til § 21

Føroya váðaráð hevur sum fremstu uppgávu at eyðmerkja og hava eftirlit við systemiskum fíggjarligum váða.

Til § 22

Mett verður, at virkisført váðaráð við rættari samanseting telur 5 limir. Stjórin í landsbankanum er føddur formaður í váðaráðnum. Skipanin við váðaráðnum tekur grundleggjandi støði í, at verandi myndugleikar við ábyrgd og uppgávum, ið virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum, skulu hava umboðan og gera tilmæli til løgmann um, hvørjir limirnir í ráðnum skulu vera. Umráðandi er, at fakliga og óhefta umboðanin í ráðnum er í yvirvág, tí verður váðaráðið umboðað av óheftum serfrøðingum á økinum. Sum óheftir fakligir stovnar skulu Landsbanki Føroya og Búskaparráðið gera hvør sítt tilmæli til løgmann um at velja óheftar serfrøðingar. Landsbankastjórin er formaður í ráðnum og tveir óheftir serfrøðingar, innstillaðir av Landsbanka Føroya og Búskaparráðnum, eru ráðslimir. Landsstýrið tilnevnir tveir limir við servitan, umboðandi útinnandi lóggávuvaldið í Føroyum.

Til § 23

Í høvuðsheitum verður uppgávan at eyðmerkja og hava eftirlit við systemiskum fíggjarligum váðum í føroyska fíggjargeiranum, í almenna búskapinum og búskapinum í síni heild. Við støði í váðagreiningum, sum Landsbanki Føroya framleiðir, skal ráðið ráðgeva myndugleikum á økinum um, hvussu ein systemiskur fíggjarligur váði skal viðgerast. Ráðið skal kunna greiða frá eygberingum og koma við ávaringum og tilmælum til viðkomandi myndugleikar, politisku leiðsluna og til almenningin. Sostatt verður ráðið ráðgevandi, og verandi myndugleikar varðveita verandi status og myndugleika.

Áskoðanir frá váðaráðnum kunnu hava ymiska formliga styrki og vera løgd fyri almenningin ella viðkomandi myndugleika á økinum, annnaðhvørt sum ein eygbering (observatión), ávaring ella tilmæli.

Tá ið ein áskoðan verður borin fram sum ein **eygbering,** metir váðaráðið, at ábending er um, at ávís viðurskifti kunnu økja systemisku váðamyndina, og neyðugt verður at halda neyvt eyga við tí. Ein eygbering er vanliga almen og nýtist ikki at vera rættað ímóti ávísum myndugleika.

Ein áskoðan, borin fram sum ein **ávaring,** hevur størri formliga styrki enn ein eygbering. Tá ið talan er um ávaring, metir váðaráðið, at greið tekin eru um vaksandi systemiskar fíggjarligar váðar, og mælt verður til at taka stig til tess at bøta um viðurskiftini. Ávaringar kunnu verða rættaðar móti einum ella fleiri myndugleikum, og tann, ið fær ávaringina, hevur skyldu til innan 3 mánaðir at koma við almennari frágreiðing, har mett verður um ávaringina og í hvønn mun, neyðugt verður at fara víðari, antin við neyvari kanningum ella ítøkiligum broytingum.

Eitt **tilmæli** frá váðaráðnum hevur størri formliga styrki enn ein ávaring. Tilmælið er eitt ítøkiligt uppskot um broyting, ið váðaráðið metir vera neyðugt at seta í verk til tess at avmarka fíggjarligar váðar. Tilmælið kann vera rættað móti einum ella fleiri myndugleikum, og móttakari av tilmæli hevur síðan skyldu til, áðrenn 3 mánaðir er farnir, antin at seta tilmæltu broytingarnar í verk ella koma við frágreiðing, har grundgivið verður fyri, hví tilmælið ikki verður fylgt.

Váðaráðið skal kunna bera fram eygberingar og ávaringar til almenningin og viðkomandi myndugleikar. Ein eygbering er altíð almenn, men ávaring og tilmæli skulu vera almenn, uttan so at váðaráðið metir, at atlit at fíggjarliga støðufestinum krevur, at ávaring ella tilmæli skal vera latin í trúnaði.

Til tess at styrkja um virknað við givnum áskoðanum (eygbering, ávaring ella tilmæli), verður miðað eftir fullum semjum í váðaráðnum. Tá ið talan er um ávaringar og tilmælir, ið viðvíkja regluverkinum á økinum, kann ivamál um gegni standast av, um so er, at limir, umboðandi stjórnarráð í Føroyum, dagliga virka í stjórnarráðum. Í tílíkum førum hava hesir limirnir ikki atkvøðurætt, men bara talurætt. Um umboðini hjá stjórnarráðum virka í føroyska tryggingareftirlitinum, ið er óheftur eftirlitsmyndugleiki, hava umboðini annars atkvøðurætt í øllum øðrum málum. Landsbankastjórin og óheftu serfrøðingarnir hava atkvøðurætt í øllum málum.

Hagstova Føroya er undantikin krøvunum um at veita Føroya váðaráði atgongd til upplýsingar, sum Hagstova Føroya hevur fingið frá borgarum, myndugleikum, stovnum og fyritøkum, sambært lóg um Hagstovu Føroya og altjóða reglum um hagtalsvirksemi.

Til § 24

Landsbanki Føroya er skrivstova hjá Føroya Váðaráði. Landsbankin kann heita á aðrar viðkomandi myndugleikar at vera við í arbeiðinum. Tað merkir tætt og opið samstarv og at deila førleikar, hagtøl og aðrar upplýsingar sínaámillum eftir tørvi.

Til § 25

Fyri at kunna útinna sítt virksemi er neyðugt hjá Landsbanka Føroya at fáa umbidnar og rættar upplýsingar. Ásetingin í § 25 heimilar revsing, um so er, at Landsbanki Føroya ikki fær umbidnar upplýsingar, ella um hann fær skeivar ella villleiðandi upplýsingar. Tey, sum kunnu revsast sambært hesi áseting, eru feløg og privatpersónar, landsstovnar, grunnar, almenn partafeløg, kommunur og kommunal feløg o.o.

Til § 26

Løgtingslógin verður sett í gildi 1. januar 2017. Tó verða partar av løgtingslógini settir í gildi 1. oktober 2016. Tað er galdandi fyri §§ 2-5, ið eru viðvíkjandi nevndar- og stjóravali til Landsbanka Føroya. Hetta er neyðugt, skal Landsbanki Føroya kunna vera virkin og átaka sær uppgávurnar í hesi løgtingslóg frá 1. januar 2017.
Hartil ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð, nær kapittul 2 í lógini um Føroya váðaráð kemur í gildi. Hetta gevur landsstýrismanninum møguleika at seta Føroya váðaráð í verk sambært lógini, tá klárt er at fara til verka, eitt nú við skrivstovu hjá Føroya váðaráði í Landsbanka Føroya. Kunngerðin skal í seinasta lagi vera lýst 1. juli 2017.

Fíggjarmálaráðið, 25. juli 2015

Kristina Háfoss
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringsvar frá Vinnuhúsinum
Fylgiskjal 2: Hoyringsvar frá Felagnum Peningastovnar
Fylgiskjal 3: Hoyringsvar frá Hagstovu Føroya
Fylgiskjal 4: Hoyringsvar frá Fakfelagssamstarvinum
Fylgiskjal 5: Viðmerkingar frá danska Vinnu- og vakstrarmálaráðnum